

*Leiklutirnir eru broyttir: David Miliband stendur nú í skugganum á yngra beiggjanum*

# REYÐI ED

HANN TREIN FYRI FYRSTU FERÐ ÚR **SKUGGANUM** HJÁ ELDRA BEIGGJANUM, TÁ HANN VANN **FORMANSVALIÐ** Í ENSKA **LABOUR-FLOKKINUM** Í VIKUSKIFTINUM. NÚ HAVA ENSKU ARBEIÐARARNIR HAVA SETT SÍTT ÁLIT Á **»RED ED«**



**FORMANSSKIFTI**
Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Hann hevur altíð runnið í hølinum á eldra beiggjanum.

Hann las heimspeki, politikk og búskaparfrøði á Oxford University, eins og beiggin.

Hann vardi sosialistisku sjónarmiðini í tannáringaárunum, sum beiggin eisini legði stóra orku í.

Hann hevur somu yvirskipaðu politisku sannføring og fór sama politiska vegin sum beiggin, tá hann bjóðaði seg fram fyri enska Labour-flokkin.

Hann valdi somu síðu sum beiggin í innanhýsis stríðnum í Labour og tók undir við sjónarmiðunum hjá Gordon Brown, heldur enn Tony Blair, sum fyrstu árini fyri aldarskiftið togaðust um, hvønn veg flokkurin skuldi fara.

Tí navnkendi hann seg bara sum »hin Miliband«.

Nú verður tað helst eldri beiggin, sum fer at brúka tað vendingina.

Ed Miliband vann formansvalið í Labour í vikuskiftinum. Nærmasti kappingarneytin var eldri beiggi hansara, David Miliband. Við sigrinum trínur yngri beiggin úr skugganum á eldra beiggjanum fyri fyrstu ferð.

## Marxistiskur pápi

Stjórnarskipanin og politiskt kjak hevur altíð havt virkan leiklut í heiminum hjá Miliband.

Úrslitið av ósemjuni millum stórveldini í Evropa var skotbrestir og blóð, tá Adolphe Miliband, pápi teirra, flutti úr Belgia til London í 1940. Hermenninir hjá Hitler fóru buldrandi inn í belgiska økið, tá familjan Miliband flýddi til Onglands fyri at bjarga lívinum.

Adolphe Miliband, sum seinni skifti navn til Ralph, var talsmaður fyri ensku marxistarnar og ræddist ongantíð at tala alment at virkseminum í enska arbeiðaraflokkinum.

Mamma teirra, Marion Kozak, var eisini virkin á enska vinstravonginum.

Døgurðakrókurin í heiminum hjá familjuni Miliband hýsti fleiri drúgvum og rokmiklum orðaskiftum um sosialistiskan politikk. Við árunum luttóku báðir synirnir í kjakinum við hús.

Robin Blackburn var ofta á vitjan hjá familjuni Miliband. Hann minnist væl ungu og ágrýtnu synirnar.

– Teir vóru sera, sera skilagóðir. Eg minnist serliga, at Ed tók meg fullkomiliga á bóli, tá hann loysti Rubik's Cube eftir einum minutti og 20 sekundum, sigur Tony Benn við BBC.

Skúlanæmingarnir Miliband gjørdu ikki stórvegis um seg. Teir hildu seg oftast aftur og løgdu nógv fyri at vera væl fyrireikaðir og røkja sínar skyldur.

Ed Miliband hevur seinni staðfest argandi, at hann var tó ikki so nørdutur, at floksfelagarnir løgdu á hann.

## Ymsir beiggjar

Enskir miðlar gita dúgliga, hvussu formansstríðið hevur ávirkað viðurskiftini millum brøðurnar.

David Miliband boðaði frá mikudagin, at hann tekur seg aftur í politikki. Orsøkin er einføld, sambært honum.

– Tveir beiggjar skulu ikki stjórna Bretlandi. Eingin skal seta spurnartekin við, hvør er oddamaðurin í flokkinum. Tí verði eg bara vanligur parliamentslimur í framtíðini, boðaði hann frá á tíðindafundinum. Hann segði, at miðlarnir royna at finna skørð í hansara stuðuli til yngra bróðurin, og slíkan illgruna ynskir hann ikki.

Meðan almenna ljósið er varpað á beiggjarnar, hava ongar ábendingar verið um, at ólag er komin millum teir.

– Tú stóð teg sera væl í formansstríðnum. Eg elski teg, segði Ed Miliband við eldra beiggjan á tíðindafundinum, tá úrslitið varð kunngjørt.

Ed Miliband hevur sagt, at David Miliband er als ikki liðugur í bretskum politikki, hóast hann ikki fekk neyðuga stuðulin frá floksfeløgunum á formansvalinum í Manchester síðsta leygardag.

Oona King hevur altíð staðið brøðunum nær. Hon ger greitt, at teirra viðurskifti verða fyri bakkasti.

– Sjálvandi ávirkar tað. Tað eru dømi um, at politikkur fær ólag í familjur, og tað kemur ikki óvart á meg, um brøðurnir verða ávirkaðir av úrslitinum, sigur King fyri BBC.

David Miliband var nýggja stjørnan á politiska hválvinum, tá hann tók við sum uttanríkisráðharri í 2008. Skoðsmálini vóru beinanvegin, at langt um leingi hevði Bretland ein uttanríkisráðharra við hugsjónum. Hann var serliga væl umtóktur, tí hann lát ongantíð við halanum, tá republikanski forsetin í USA og hansara nýkonservativu ráðgevar settu hann undir trýst.

Politiskir serfrøðingar siga, at brøðurnir eru ikki so líkir politiskt, hóast alt. David Miliband er meira høgravendur á vinstraveinginum enn beiggin.

David Miliband var leingi mettur at verða komandi floksformaðurin. Hann hevur verið meira alment frammi.

Ed Miliband hevur verið ráðharri við orku- og veðurlagsmálum í stjórnini hjá Gordon Brown. Hann hevur áður starvast sum sjónvarpsmaður.

## Red Ed

Labour hevur fingið luft undir veingirnar aftaná formansvalið.

Tað er væntað, at Ed Miliband fer at flyta flokkin meira til vinstru, enn verkætlanin við New Labour ætlaði.

Neil Kinnock, sum var formaður í Labour frá 1983 til 1992, sigur, at langt um leingi fer flokkurin at arbeiða fyri sínum sjónarmiðum undir leiðslu av "Red Ed", sum Ed Miliband verður róptur.

– Flokkurin er í tryggum hondum, og vit fara at vinna valið uppiborið næstuferð. Miliband yngri er ein sera dugnaligur politikkari, sigur Neil Kinnock við BBC.

**Keldur:**
*http://www.bbc.co.uk/news/uk-politics-11433643*
*http://www.bbc.co.uk/news/uk-politics-11316855*
*http://www.bbc.co.uk/news/uk-politics-11434*

## FAKTA **ED MILIBAND**

**Ed Miliband**
**40 ára gamal**
**Heldur saman við Justine Thornton**
**Tey hava ein son**
**Útbúgvin á Oxford University og London School of Economics**
**Var ráðharri við orku- og veðurlagsmálum í stjórnini hjá Brown**
**Fyrrverandi sjónvarpsmaður**

**RED ED**
**er navnið, sum bretskir miðlar rópa Ed Miliband. Reyði liturin er tekin um kollvelting, sinnisrørslu og sosialismu, og tað eru lýsingarorðini, sum eru mest nýtt um nýggja formannin í Labour**

**IRAK-KRÍGGIÐ**
**David Miliband, eldri beiggin, hevur altíð tala at krígnum í Irak. Ed Miliband hevur eisini sett kríggið á dagskránna. "Irak-kríggið hevur havt við sær, at bretar hava mist álitið á stjórnina í landinum. Og eg skilji tað væl. Grundgevingarnar kunnu ikki verjast," hevur hann sagt.**

**FÁAR ATKVØÐUR**
**Tað vóru fáar atkvøður, sum skiltu Miliband-brøðurnar á formansvalinum. Bretskir serfrøðingar siga, at báðir hava hugsjónir og ræðast ikki broytingar. Orsøkin, at yngri beiggin vann, er, at hann gjørdi meira um seg seinastu vikurnar undan valinum, verður mett. Tríggjar milliónir flokslimir greiddu atkvøðu.**

**STUÐLAR BEIGGJANUM**
**Hóast David Miliband hevur tikið seg niður av ovastu rók í Labour-flokkinum, fer hann framvegis at stuðla beiggjanum. Hann fer at lata bróðurin finna eina nýggja leið, sum kann beina Labour fram at aftur stjórnarvaldinum í Bretlandi. – Havi eg nakað at siga beiggja mínum, so geri eg tað privat, segði David Miliband á tíðindafundinum mikudagin.**

**LABOUR AFTUR FREMST**
**Fáar dagar eftir, at Ed Miliband varð valdur til formann, vísti ein veljarakanning, at Labour hevur størri undirtøku enn Konsevativi flokkurin – fyri fyrstu ferð í trý ár. Sambært kanningin hevði Labour fingið 40 prosent av atkvøðunum, um val var nú. Konservativi flokkurin hevði fingið 39 prosent, og samgonguflokkurin, Liberaldemokratarnir hevði fingið 12 prosent. Seinast, Labour var á odda í veljarakanning, var í oktober í 2007.**